# Minningarorð um Doris Bærentsen



Frá einum degi til annan, frá einari løtu til aðra, umrøða vit okkara kæru í tátíð.

Hetta er ræðandi, álvarsligt og kensluborið.

Mikumorgunin komu boðini um, at Doris ikki var millum okkara longur. Hetta kom tó ikki heilt óvæntað, tí Doris hevði verið sjúk leingi.

Tað tykist so stutt síðani, at vit heilsaðu Doris á hennara síðsta arbeiðsdegi.

Vit frøddust um, at Doris og Poul kundu njóta ellisárini saman.

Men soleiðis skuldi ikki vera. Doris bleiv stutt eftir hetta álvarsliga sjúk.

Poul vitjar okkum javnan, og soleiðis hava vit kunna fylgt Doris og skilt, hvussu hon spakuliga varð tikin frá okkum.

Vit minnast aftur á tíðina, tá ið Doris og Poul komu saman; útferðina í góðveðrinum úti í Skúvoy og mangt annað.

Doris var arbeiðssom, røkin og friðarlig. Hon var lættsint, smílandi og blíð.

Verumátin hjá Doris, tað sum hon gjørdi og segði, vísti eitt slíkt skynsemi og ein slíkan lívsvísdóm, sum vit kundu vera takksom fyri at fáa lut í.

Hóast mótburð gramdi Doris seg ikki.

Høvuðpína og tað, at hon ikki hoyrdi so væl, nívdi hana, og gjørdi eisini, at hon tey seinnu árini ikki hevði somu gleði í felagslívinum.

Doris tosaði, greiddi frá og gleddist um børn og ommubørn. Vit ynsktu so fegin, at henni untist fleiri ár saman við tykkum.

Harrin troysti tykkum í sorgini - teg Poul, systir, børn, svigarbørn og ommubørn.

Tað verða varðar settir á lívsleiðini, -Doris var ein av okkara.

Við hesum fáu orðum lýsa vit frið yvir minnið um okkara góðu Doris.

**Starvsfelagar í Føroya Sparikassa**

## Minningarorð um elskaðu systur mína

# Mariannu Joensen

**f. 23.08.1978 d. 24.05.2002**



Longu er gingið eitt ár síðan Marianna flutti heim til Harran. At hon bert skuldi verða her hjá okkum í knapt 24 ár, hevði eingin væntað. Men soleiðis bleiv tað. Eitt er sikkurt at gudurin í hesum heimi, vil gera alt fyri at ræna, oyðileggja og stjala. Og tað eru løtur har ið alt virkar sum um hann hevur tikið alt frá okkum; skrætt eitt stórt petti úr familjulívinum hjá okkum, og man stendur bert spyrjandi....hvat og hví..??

Men tann ið sigur seg verða Vegurin, Sannleikin og Lívið, og sum hevur sett búgv í okkara og Mariannu´sa hjarta, Hann hevur givið okkum ein frið og eina gleði, ið røkkur upp um allan ótta, og alla sorg. Tá alt virkar vónleyst, so vísur Hann Vegin, ið vit sum Hansar´ børn ganga á, og hvar hann førur til. Tá alt sær út til at miseydnast, tað bleiv ikki sum vit ætlaðu; so vísur Hann okkum á Sannleikan, ið er Himmalin, gullgøtur, gleði, friður, dansur, lovsongur... og har skulu vit sum Hansar´ børn búgva í ævir; har búleikast Marianna í dag...!!! Vit kunnu bert liva í einum tryggleika, at Marianna hevði valt Lívið! Hon trúði á tann elskaða Babba í Himlinum, ið hon situr saman við í dag. Ein dag skulu vit síggjast aftur. Tárini hava hug at renna av gleði, tá tankarnir leita fram til tann eina dag, har vit skulu savnast aftur. Øll okkar´ kæru ið fóru her frá; nøkur á ungum árum, og onnur seinni í lívinum.

Marianna; tú vart altíð ein glað og lítillátin genta. Tú hevði ikki tað størsta sjálvsáliti ið ein kann hugsa sær, men tú visti hvør tú vart í Honum, sum gav tær styrki, vón og eitt lív ið var vert at liva; sjálvt um dagarnir ikki vóru so mangir.... Tað síðstu tíð av tíni sjúkralegu, merkti tú serliga nógv til hetta, su tú ofta tókst til: Eg orki alt í Honum sum ger meg sterkan.... og ....sum dagur tín er skal tín styrki verða....!! Guds orð.... tað gav lív.

Tað eru so nógvar løtur ið vit altíð vóru sera glaðar fyri...: Tá vit vóru uttanlandatúrar í Íslandi, øll leikutøjini ið vit keyptu heim við, tað var ein rúgva. Allar sunnumorguns-biltúrarnar ið eg, tú, Annebeth og babba fóru at henta flóskur, meðan mamma gjørdi døguðra..... tá var tað luxus at vit hvønn sunnudag fingu hvør sína glas-sodavatns-flósku til døguðra, har babba gjørdi eitt hol í proppin. Og so annars bara dagligdagarnir, har tit ansaðu uppá meg meðan mamma og babba vóru til arbeiðis.

Vit vóru allar glaðar tá vit fingu bæði Jonnu og Biritu til lítlusystrar. Nú vóru vit 5 systrar og tað verða vit altíð....!

Tað er so nógv ið vit kunnu minnast afturá og gleðast um; at vit hava nýtt nógva tíð saman, er gullverd tíð...!!!

Marianna; vit fara altíð at sakna teg, tú eigur at verða ímillum okkum enn. Eitt ið tær ikki náddi at uppliva, er at blíva mostur, til elskuligu, fittu og deiligu Mariannu, ið bleiv borin í heim tann 04. apríl í ár. Hon eitur eftir tær.... Hon hevur veruliga sett seg í okkar´ tómrúm eftir missin av tær. Men ein dag skulu vit øll verða saman aftur.... eg gleði meg. Tað verður ein stór løta, ein stórur dagur.

Marianna; tey ið kendu teg hava mist nakað dýrabart, nakað gott. Arbeiðsfelagar tínir minnast bara gott um teg; vinir sakna teg; og plássið við uppvørpuna inni í Kelduni, har manglar tú. Og her heima; tú eigur at verða her....! Vit sakna teg.

Álítandi, trúføst og kærleiksfull... nøkur av orðunum, ið kunnu sigast um teg.

Marianna; hetta er ikki fyrstu ferð eg royni at skriva minningarorð um teg; eg havi gjørt fleiri royndir gjøgnum tað farna árið, men tað er so ringt. Tað vildi verið lættari at skriva eina bók. At skriva nøkur fá orð um systur sína, er næstan ómøguligt.

Men eg vil enda við hesum orðum, og lýsa frið yvir minni um elskaðu systir mína Mariannu.

**Systur tín Alice**

*Navnið Jesus, stóra navnið Jesus*
*eg í Jesu navni havi lív í dag.*

*Eg skal altíð prísa Jesu navnið,*
*sum úr myrkri inn í ljósið setti meg.*
*Onnur nøvn øll skulu blikna.*
*Tó skal Jesu navn ei vikna,*
*gyrt í vakurleika lívgar tað mítt sinn,*
*tað er songurin sum fyllir Himmalin.*

*Skjótt so stendur perluportrið opið,*
*og í lívsinslandi, skal eg síggja Hann.*
*Hann sum bar tað dýra navnið,*
*yvir øllum øðrum nøvnum.*
*Tað gav gleði, troyst,*
*har sorg og sjúka var;*
*ævigt lív ígjøgnum krossins verk mær gav....*

## VIÐMERKINGAR

# Ja, yvir og farin, Høgni

**Eilif Samuelsen**



Hóast seinasta innleggið enn einaferð prógvar, at tað er fáfongt at skifta orð við Høgna Hoydal, so eigur tað kortini at vera gjørt einaferð aftrat, fyri at tað kanska fær tað at ganga upp fyri honum, hvussu ómetaliga stórur demagogur, hann í veruleikanum er. Tað at forføra eitt heilt fólk er sanniliga ikki hvørs mans føri, men í seinna enda man tað fara at vera tengt at lítlum heiðuri.

Eg vil ráða Høgna Hoydal til at lesa talu sína einaferð enn og síðani sakligu viðmerkingar mínar. Hvar í mínum viðmerkingum finnur hann *persónligt brigsl, persónligar niðurgeringar og ógrundað álop?* Hann boðaði sjálvur frá, at tað fór at vera ein politisk tala, so mátti hann eisini tolað nakrar politiskar viðmerkingar uttan at flippa heilt út í ekstremum spindoktaralótum. Men tá ið hann hevur tikið sær einkarrættin til at viðgera mál sakliga, og øll onnur eru ósaklig, so eru øll onnur 'på herrens mark'.

**Skúlin yvirtikin**

Alt reypið um, hvussu nógv Tjóðveldisflokkurin hevur fingið á skafti í skúlamálum, er líka innantómt sum "bragdið" at yvirtaka skúlan.

1. januar 2002 var skúlaverkið yvirtikið á føroyskar hendur. Tey mundu ikki vera nógv, sum gáaðu eftir, at henda stórhending fór fram. Í Fregnum, sum var einasti fjølmiðil, sum gjørdi nakað burturúr, stóðu m.a. hesi orð at lesa: *"Hin føroyski skúlin varð føddur 1. januar 2002. og 3. januar var fyrsti skúladagur í honum. Men Mentamálastýrið og Óli Holm, landsstýrismaður, hildu eftir øllum at døma*

*Framhald á næstu síðu*



## Minningarorð um

# Gullbrand Simonsen



Ja, góði bróðir, stuttligari hevði verið at sett seg at práta saman, enn at seta seg at minnast teg. Sum prestur segði í gravtaluni, so høvdu vit eitt sera trygt og gott heim. Av seks systkjum eru vit nú bert tveir eftir, og so Sigurd, sum eisini vaks upp hjá okkum.

Tú var mær ein góður bróður frá fyrst til síðst, eg minnist fyrst undir krígnum, pápin, sum sigldi undir krígnum, hevði keypt mær vakrar løriftsskógvar. Fyrsta dagin, eg var í teimum, tvassaði eg í mýrulendi, so teir sóu ikki vakrir út. Men fyri at eg skuldi sleppa undan revsing, og áðrenn mamman og pápin fingu eyga á teir, tók tú skógvarnar og vaskaði teir so frægar sum teir nú eina ferð fingust. Soleiðis var tá ið sorgin fyrst kom á dyrnar hjá okkum, pápin lá á sjúkrahúsi, tú tjúgu ár, eg fjúrtan. Eg minnist, hvussu róliga og stillisliga tú bar mær boðini um, at pápin var deyður. Tá var ongin sosialhjálp at heinta, so tá var eitt at gera og tað var at fara til verka, Eplini blivu goymd niðri í sandi um veturin, so tá ið farast skuldi eftir eplum ella eftir torvi, og eg var meira kridlutur, legði tú mær góð ráð: skjótari vit byrja, skjótari er tað liðugt, tí hetta má jú gerast. Somuleiðis tá ið tú kom aftur av skipi og segði okkum frá, at tú hevði biðið nólsoyingin smíða ein bát og bjóðaði Gilstein og mær at verða við. Hesin bátur var okkum til stóra gleði í húsarhaldinum.

Eftir at vera forlovaður í nøkur ár, giftist tú við Odvør Viderø av Sandi í 1957. Tit gleddust um at fáa trý børn, Emil, Kristian og Hannu Mariu. Átjan ár eydnaðist tykkum at fáa saman, til hon í 1975 andaðist eftir ringa sjúkralegu. Hesa sorg tók tú eisini stillisliga og klagaði ikki. Sama árið var Sandsbygd eisini fyri svárum missi, har Egil Horn, skúlastjóri, doyði. Eftir sat kona hansara Maja við tveimum smáum børnum, Jógvan og Malan.

Tað gekk ikki so long tíð, til tit bæði, Maja og Gullbrand, tóku ta skilagóðu avgerð at kasta saman, og hava tit havt eitt fyrimyndarligt lív saman við børnum tykkara og so við svigarbørnum og ommu- og abbabørnum.

Meðan Gullbrand var sjómaður, sigldi hann nógv sum stýrimaður við fiskiskipum, og veit eg eisini av egnum royndum, at hann var ein álitismaður á sjónum. Kvøðari var tú av teimum bestu, hevði dansin væl undir fót, so tað var ein frøi at dansa saman við tær, og tú verður nógv saknaður av øllum, sum tráddu gleðis-dansin. Sangari var tú góður, og tá ið vit sótu í okkara fasta plássi í kirkjuni, eg framman fyri teg, tá var óneyðugt at lurta eftir orglinum, tí tú hevði altíð tann rætta fasta tónan.

Fyri tveimum árum síðani kom tú aftur fyri ta vanlagnu at missa sonin Kristian. Hetta tók tær og tykkum øllum sera fast. Og eftir hetta tók sjúkan yvirhond hjá tær, so røddin bæði í kirkjuni og í tí dagliga viknaði í hvørjum; men onkran dag, vit møttust í kirkjugarðinum, kundi tú gleðast og siga, at í dag orkaði eg nokkso væl at syngja. Ein dagin, vit sótu og prátu saman um alt sum okkum hevði verið fyri, kundi eg ikki lat avera við at spyrja: Hoyr Gullbrand, munnu vit vera gandaðir? Hann svaraði beinanvegin: Nei, Sólvit, tað verður ikki lagt meira á okkum, enn vit klára. Har sat hann og kikkaði eftir hondini fyri at fáa luft og var so sterkur í trúnni, at eg mátti bert skammfullur halda við honum.

Ja, Gullbrand, tú fekk tað stríggið móti endanum, men Maja góða, trúføst sat tú við song hansara og royndi at hjálpa uppá hann til tað seinasta. Tit hava mist ein góðan mann, pápa og abba, saknurin er stórur, men gott er at hava so góð minnir um hann, sum tit hava.

Nú ið vit gleða okkum til føroyska summarið, sum tað nú einaferð er við sínum skiftandi veðurlagi, er Gullbrand komin heim til ævigt summar. Latið okkum unna honum tað væl við ynski um at síggja hann aftur, tá ið okkara tíð er komin.

Takk fyri lív títt. Hvíl í friði.

**Sólvit**

N.B. Sama dag sum Gullbrand varð borin til gravar 18. mai, vóru sjey ár liðin síðani vit mistu abbasonin Ólav av vanlukku. Í hesi sjey ár eru átta av okkara borin til gravar, so tað má sigast at hava verið ein stríggin tíð.

# Gullbrand Simonsen

**f. 29/2 1928 d. 13/5 2003**

Meðan kirkjuklokkan á Argjum sló tíggju týsmorgunin 13. mai 2003, andaðist Gullbrand Simonsen av Sandi á Landsjúkrahúsinum eftir svára sjúkralegu.

Gullbrand varð føddur 29. februar 1928 á Sandi, og var sostatt 75 ára gamalur, nú hann legði árarnar inn. Gullbrand var sonur Emil Simonsen, í Króki á Sandi og Sigrid, f. Simonsen úr Norðadali.

Í barnaheiminum hevði sangurin sítt stóra pláss, og tann skattin, ið har bleiv lagdur í Gullbrand og systkini, bar hann í hjartanum alt lívið. Minnist meg so mangan hava hoyrt Gullbrand tikið til - eftir at hann hevði trivið í eitt gamalt ørindi: "Soleiðis plagdi mamman at syngja."

Gullbrand fór til skips og sigldi fyrra partin av verkaárum sínum. Hann hoyrdi til ættarliðið, sum var í sínum bestu árum, tá stállínuskipini komu í sekstiárunum og veittu vælferð til so manga bygd í Føroyum.

Gullbrand giftist Oddvør f. Viderø, uppi úr Stovu á Sandi, og reistu tey búgv norðan fyri Eldhús. Oddvør og Gullbrand fingu 3 børn: Emil, Kristian og Honnu Mariu. Hvítu húsini við hornavindeygunum miðskeiðis í bygdini gjørdust ramman um teirra lív og leik. Men Gullbrand og hansara lærdu brátt, at nornan spinnur okkum ymiskar lagnutráðir: Oddvør gjørdist álvarsliga sjúk og doyði 42 ára gomul í 1975.

Sama summarið andaðist eisini pápi mín. Eftir hesar sorgarleikir hendi tað praktfulla: Ástir runnu saman millum mammu og Gullbrand, og soleiðis blivu bondini millum Gullbrand og meg knýtt - hesi bond, sum - hóast ikki knýtt við blóði - ongantíð loysnaðu aftur. Gullbrand og mamma fluttu saman og giftust. Hóast eg ikki rópti Gullbrand pápa, var hann mær í flestum lutum í faðirs stað, og alt, ið hann hevur lært meg, er mær mangan komið til góðar á lívsleiðini.

Eftir at Gullbrand legðist uppi, var hann m.a. við í havnabygginini á Sandi í sjeytiárunum, var landformaður í Støðni og smíðaði saman við eldra soninum, Emili.

Gullbrand gekk nógv upp í føroyskan dans, var við í dansifelagnum og á mangari dansiferð. Serligan tokka hevði hann til Kjartan Ólavson, og tíbetur er upptøka til, har hann skipar hetta forna kvæðið.

Gullbrand var trúgvur kirkjugangari, og best dámdi honum at sita í "sínum" stóli, nevniliga tí næstaftasta mannfólkamegin. Høgtíðsdagar fór hann altíð av húsum í sera góðari tíð fyri at vera vísur í at fáa henda stólin. Hann hevði gott mál og dugdi meginpartin av sálmabókini uttanat.

Bát hevði hann í mong ár og eisini eitt sindur av seyði í Sandabrekkuni. Gullbrand gekk nógv upp í tað, sum hendi á Sandi, serliga í Støðni. Minnist, tá vit búðu niðri og telefonprátið fall á tíðindi av Sandi: altíð vóru útróðurin og líkindini fyrst á skránni. Gullbrand og mamma fingu nógv góð ár saman, og gleddu seg til at nýta otiumið, nú bæði vóru givin at arbeiða.

Men enn einaferð kvettist ein lívstráður: yngri sonur Gullbrands, Kristian, doyði 40 ára gamal eftir drúgva sjúku í 2001. Hetta neit okkum øllum og ikki minst Gullbrandi fast. Gullbrand gjørdist sjálvur álvarsliga lungnasjúkur og stríddist við hesa sjúku síni seinastu ár. Nú orkaði hann ikki longur.

Gullbrand hevur lagt árarnar inn, men í trúnni uppá, at ein dag verða nýggjar árar lagdar út, lýsi eg frið við minninum um fosturfaðir mín.

**Jógvan**

*Framhald av síðu 12*

*ikki, at hesin marknasteinur í føroyskari skúlasøgu, og kanska eisini tjóðskaparsøgu, var verdur at varpa serligt ljós á á sjálvum degnum.....*

*Góðar røður og flott tiltøk henda fyrsta føroyska skúladagin 2002 høvdu kunnað kveikt í hjartað á mongum ungum føroyingi. Men har var so eiðasørt. Okkurt hissini Merki sást veittra við skúlarnar undan hvassa útnyrðinginum, men hví so var, vóru tað tey fæstu, ið gáaðu eftir."* So vónbrotin ljóðaði Fregnir.

Hví mundi henda stórhending fara so óansað aftur við borðinum? Skúlastjórin á Eysturskúlanum hevði hetta boð, eftir at hon hevði sagt við Fregnir, at tey har á skúlanum høvdu flaggað av sínum eintingum: *"Men orsøkin til, at myndugleikarnir hava gjørt so lítið burturúr, er kanska, at meginparturin av skúlanum var føroyskur áðrenn nýggjár."*

Hevur Høgni Hoydal hugsað um, hví tað ikki var neyðugt at gera eina tað einastu skúlalóg í sambandi við yvirtøkuna?

Føroyska skúlaverkið var 100 prosent stýrt av føroyskum myndugleikum undan 2002. Eg skal geva Høgna Hoydal rætt í, at yvirtøkan bøtti eitt sindur um ta nívandi undirlutakensluna, og tann bótin kostaði føroyska samfelagnum 366 milliónir.

**Skúlastýrini**

Skúlalógin kom í gildi í 1998, og tá var nýtt landsstýri komið til. Tí var tað ein av skyldunum hjá Tórbirni Jacobsen at seta í verk skipanina við skúlastýrum, hesa desentraliserings- og demokratiseringsskipanina, sum Tjóðveldisflokkurin annars stríddist hart ímóti.

Hevði Høgni Hoydal havt sett seg bara eitt sindur inn í málið, so hevði hann sæð, at tað stóðu eingir prikkar, har sum lógargrein skuldi vera í tí lógini, sum eg legði fyri tingið. Men hann kann lesa lógaruppskotið, nevndarálitini og broytingaruppskotini, sum løgtingið atkvøddi um, so kanska hann skilir, hví § 49 kom úr løgtinginum í tí líkinum.

Annars legði eg seinni uppskot fyri tingið um broyting í Fólkaskúlalógini, sum m.a. skuldi bøta um teir skeivleikar, sum komnir vóru í lógina, soleiðis, sum hon var lýst. Men málið datt burtur, tá ið val varð skrivað út. Tað vóru fleiri av hesum broytingaruppskotum, sum m.a. Tórbjørn Jacobsen fekk framt.

Høgni Hoydal skrivar, at *ein orsøk til, at so nógvir skiftandi mentamálaráðharrar hava verið hjá Tjóðveldisflokkinum, er júst tí, at teir hava havt visiónir og ætlanir um veruligar broytingar og betringar.* Mundi tað vera tí, at Signar á Brúnni og Óli Holm fingu so stutta ævi sum landsstýrismenn?